TOYOTA

## Plátusmiður uttan skøvur í lakkinum

Til plátuverkstaðin sóknast vit eftir einum væl royndum plátusmiði.

Plátuverkstaðurin umvælir nærum allar plátu- og karossarískaðar fyri viðskiftafólk okkara.

Til plátuverkstaðin hoyrir eisini lakkverkstaður, har vit umvæla smærri lakkskaðar, eins væl og vit heillakera bilar.

Sum plátusmiður fært tú góðar arbeiðsumstøður til tær nógvu og krevjandi uppgávurnar. Vit leggja stóran dent á gott arbeiðsumhvørvi og góðan trivnað. Hinvegin krevja vit, at plátusmiðurin kann arbeiða sjálvstøðugt, og tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til arbeiði við upprættarabonki av slagnum Caroliner.

Hóast talan er um arbeiði, har tú hugsar og arbeiðir sjálvstøðugt, er plátusmiðurin partur av einum toymi, har aðalmálið er valaverk til ein nøgdan skara av viðskiftafólki.

Løn sambært avtalu.

Eru spurningar um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Páll av Teigum. Umsóknir skulu innan 27. januar sendast til:

Reyni Service
Plátusmiður
Vegurin Langi
188 Hoyvík

SENDISTOVAN

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

IÐFLOKKURIN



## Míni hjartamál eru:

- Tey kristnu virðini
- Almanna- og heilsumál
- Røktarstarvsfólk uppnormerast
- Nøkta tørvin hjá teimum brekaðu, teimum sjúku og teimum gomlu
- Neurologisk ambulatorium setast á stovn
- Uppvenjingardepil fyri allar neurologiskar sjúkur

**Kristianna Michelsen,**
**sjúkrarøktarfrøðingur**

**Valevni hjá Miðflokkinum lista H**

www.midflokkurin.fo




Sjónband 317774

Vit sóknast eftir starvsfelaga til eitt spennandi og fjølbroytt starv. Leiðslusamskiparin vísir beinleiðis til stjóran, og skal í høvuðsheitum taka sær av fylgjandi:

**Marknaðarføring**
Tú hjálpir sølu- og marknaðarleiðaranum at samskipa og avgreiða øll marknaðarføringsátøk felagsins. Tú hevur ábyrgd av okkara miðlaætlan, tú samskipar samstarvið við uttanhýsis veitarar og tryggjar, at øll raðfest marknaðarføringsátøk verða avgreidd sum ætlað.

**Rakstur**
Tú hjálpir rakstrarleiðaranum við samskipan og avgreiðslu av ymsum rakstrar- og fyrisitingarligum uppgávum. Samstundis hevur tú ábyrgdina av skeiðskalendaranum fyri øll 110 starvsfólkini hjá Føroya Shell.

**Umsiting**
Leiðslusamskiparin er eisini stjórnarskrivari hjá Shell, so tú hjálpir stjóranum og umsitigardeildini við samskipan og avgreiðslu av ymsum umsitingarligum uppgávum. Hetta kann t.d. vera prísbroytingar og prísútrokningar, dagføring av heimasíðu, innsavnan og tilrættalegging av tilfari til nevndina hjá Shell. Tú er skrivari á leiðslufundum, og hevur annars annað vanligt umsitingararbeiði um hendi.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini fyritøku, har nógvar spennandi broytingar henda í løtuni. Vit geva rætta persóninum góðar arbeiðstreytir, kappingarføra løn við eftirløn og førleikamennandi skeið. Tú fært møguleikan at tilrættaleggja starvið, arbeiðsdag og arbeiðstíð, so tað passar tær best – sjálvandi í samráð við stjóran. Starvið er eitt fulltíðarstarv, men um tú ynskir niðursetta arbeiðstíð, er eisini møguleiki til tess.

**Vit ynskja:**
Ein starvsfelaga við góðum yvirliti og góðum evnum innan samskipan, og vit vænta at tú trívist við støðugum avbjóðingum. Tú dugir væl við fólki, og tú hevur eitt lætt og fyrikomandi lyndi. Tú dugir væl at samskifta á bæði føroyskum og enskum, og hevur tú eina hóskandi útbúgving og royndir innan samskipan, er tað ein fyrimunur.

**Umsóknin**
skal sendast til Shell, Vestara Bryggja 10, FO 110 Tórshavn, ella til hendrik@shell.fo innan 24 januar kl 10.00. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Hendrik Egholm, stjóra, á telefon 347410/215939, ella á omanfyristandandi teldupostadressu. Tú byrjar so skjótt tilber, tó ikki seinni enn 1. mars.

www.shell.fo